KÍ stríddi seg til stigini

Løgmanssteypið: Vágbingar, sum vóru undirmannaðir í meiri enn ein hálvan tíma, misnýttu stórar møguleikar í 1. hálvleiki

Tað er altíð strevið at spæla móti VB á Vágseiði. Hetta vita allir fótbóltsspælarar, og klaksvíkingar fingu hetta enn eina ferð staðfest, tá teir sunnudagin vóru fyrstu ferð í Suðuroy.

KÍ vann 3–1 í einum dysti, sum bar brá av, at talan var um fyrstu týdningarmiklu royndina á árinum, og nú verður talan so at siga um toppdyst, tá klaksvíkingar komandi sunnudag skulu til Sumbiar.

VB spældi við tíggju monnum í meiri enn ein hálvan tíma. Krzysztof Popczynski og Jan Andreasen fingu eftir samanbrest eitt gult kort í part, og tá VB maðurin í 1. hálvleiki hevði sæð kortið, kom reyða kortið eisini úr lummanum hjá Birgiri Sondum.

Útvísti maðurin hevði í 1. hálvleiki misnýtt tveir stórar møguleikar, og Palli Augustinussen hevði sent í stólpan, áðrenn KÍ setti hol á. Ove Nysted, sum hesa ferð fekk møguleikan at vísa, at hann er møguleiki at fylla holið eftir Kurt Mørkøre, var púra blankur, tá fýra vágbingar høvdu eyguni eftir Heðini á Lakjuni, sum streyk ígjøgnum í vinstru og legði innfyri.

Heðin á Lakjuni var sera væl upplagdur. Hann økti til 2–0 eftir frágera gott uppspæl í høgru, sum Marek var arkitektur aftanfyri, og Heðin staðfesti sigurin í evstu løtu eftir samanspæl við innskifta unglingan Hjalgrím Elttør.

VB stríddist nógv, eftir at teir høvdu mist ein mann. Jón Pauli Olsen, sum varð fluttur fram í álopið, tá teir fingu reyða kortið ímóti sær, minkaði um munin, eftir at Robert Cieslewicz í høgru hevði sneitt fleiri av og frá baklinjuni lagt innfyri.

Kend andlit

Bæði vágbingar og klaksvíkingar hava mest sum sama fólkið tókt, sum teir høvdu í fjør. Hjá VB var Eyðun Jacobsen aftasti útispælarin frammanfyri Bjarna Johansen, og Magni Jacobsen og Mikael í Lágabø vóru eisini í miðverjuni.

Palli Augustinussen var á miðvøllinum í høgra borði og Jón Pauli Olsen í vinstra borði. Janus Kjærbo var verjukendur miðvallari, og hini bæði miðvallarplássini røktu Tórður Holm og Milan Kulic. Í álopinum vóru Robert Cieslewicz og Krzysztof Popczynski. Jón Gærdbo, Petur Óli Samuelsen og Marner Richard vórðu allir skiftir inn.

Pól Thorsteinsson er plágaður av skaða. Enn er ógreitt, um hann fer at spæla við VB, ella um hann flytir til Reykjavíkar at spæla við Váli.

Hjá KÍ var Gunnar á Steig í málinum. Andrzej Pacek var skaddur, og í fýra manna verjuketuni vóru Harley Bertholdsen, Niclas Niclasen, Jan Andreasen og John Ryan. Á miðvøllinum vóru Rógvi Jacobsen, Jan Joensen og Marek Vierzbicki, og í álopinum vóru Arnold Joensen, Ove Nysted og Heðin á Lakjuni. Í 2. hálvleiki kom Hjalgrím Elttør inn, og í síðsta minutti varð Fríðin Ziskason innskiftur.

JH

VB–KÍ 1–3 (0–1)

0–1: Ove Nysted 31.
0–2: Heðin á Lakjuni 50.
1–2: Jón Pauli Olsen 70.
1–3: Heðin á Lakjuni 90.

Reytt kort: Krzysztof Popczynski 56.

Dómari: Birgir Sondum

Stigatalvurnar

Støðan eftir at fyrstu dystirnir í bólkaspælinum í kappingini um Løgmanssteypið eru leiktir

Bólkur 1
VB-KÍ 1-3
NSÍ-Sumba 0-1

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 KÍ	1	1	-	0	-	0	3	1	2	3
2 Sumba	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
3 NSÍ	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0
4 VB	1	0	-	0	-	1	1	3	-2	0

Bólkur 2
ÍF-B36 3-2
B68-B71 5-0

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 B68	1	1	-	0	-	0	5	0	5	3
2 ÍF	1	1	-	0	-	0	3	2	1	3
3 B36	1	0	-	0	-	1	2	3	-1	0
4 B71	1	0	-	0	-	1	0	5	-5	0

Bólkur 3
TB-GÍ 0-10
FS V-HB 1-1

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 GÍ	1	1	-	0	-	0	10	0	10	3
2 FS V	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
3 HB	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
4 TB	1	0	-	0	-	1	0	10	-10	0

Dystirnir komandi vikuskifti eru hesir:

Dystur:	Dómari:
Bólkur 1:	
02.04.00: Sumba-KÍ	Jens Petur Brattalíð
02.04.00: VB-NSÍ	Niklas á Líðarenda
Bólkur 2:	
02.04.00: B36-B71	Petur Reinert
02.04.00: ÍF-B68	Sjúrður Norðbúð
Bólkur 3:	
02.04.00: GÍ-HB	Lassin Isaksen
02.04.00: TB-FS V	Birgir Sondum

Tað skrædnaði á Sevmýri

Løgmanssteypið: Eftir at tað í fyrra umfarinum hevði verið tætt og javnt skolaðu málini ígjøgnum hjá heimaliðnum í 2. hálvleiki

Lynge Nielsen arbeiðir miðvíst fyri at mynda eitt 2. deildarlið á Tvøroyri, sum kann vera við í kappingini um uppflyting. At tað gongur rætta vegin var 1. hálvleikur móti GÍ góð ábending um. Tað gekk báðar vegir, og teir á heimaliðnum høvdu møguleikar at skora á sama hátt, sum gestirnir høvdu sínar møguleikar.

At GÍ skuldi fara norður aftur við 10–0 sigir vóru ongar ábendingar um, men 2. hálvleikur var staðfesting av, at hóast tað gongur rætta vegin hjá TB, so er langt á mál, m.a. tí liðið er mannað við ungum og óroyndum monnum, sum sjálvsagt ikki hava sinniliga yvirskotið, sum skal til at reisa seg, tá tað gongur minni væl.

Magni Jarnskor, sum var noyddur at fara av vøllinum miðskeiðis í 2. hálvleiki, tí hann hevði fingið ein lítlan løst, skoraði tvey mál beinanvegin í 2. hálvleiki. Tá tólv minuttir vóru farnir var støðan 5–0 til GÍ, og tískil var tað bara ein spurningur, hvussu stórur sigurin fór at verða.

GÍ spældi skjótari í 2. hálvleiki, enn teir høvdu gjørt í fyrra umfarinum, og at tað er munur á royndum 1. deildarspælarum og ungum og óroyndum 2. deildarspælarum var sjón fyri søgn.

Liðini

Hjá GÍ var Sunvard Joensen í málinum. Í miðverjuni vóru Pól Ennigarð og Bartal Eliasen, og í borðunum vóru Áslakur Reinert Petersen og Súni Olsen. Á miðvøllinum vóru Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen og Pauli Jarnskor og í álopinum vóru Helgi Reinert Petersen, Óli Hansen og Henning Jarnskor.

Tað vil við øðrum orðum siga, at Johan Nielsen hevði tríggjar nýggjar menn millum teir fyrstu ellivu. Í Gøtu halda teir seg ikki hava nógv fólk. Men í 2. hálvleiki settu teir tríggjar spælarar inn. Ein teirra var Hans Pauli Petersen, sum spældi eitt sindur á besta liðnum fyri trimum árum síðani. Hann skoraði eitt mál, og hann tiltuskaði sær brotsparkið, sum Pauli Jarnskor skoraði uppá. Hinir báðir vóru Jónreid Dalheim og Pól Henning Jacobsen, sum undanfarin ár hava spælt nógv á næstbesta liðnum.

Hjá TB var Magni Petersen aftasti maður frammanfyri Magna Hentze. Hinir miðverjarnir vóru Tórður Mortensen og Petur Oluf Joensen. Á vongverjanum í høgru var Teitur Rasmussen og í vinstru var Vagnur Nolsøe. Á miðvøllinum vóru Jón Tórður Holm, Bárður Dimon og Einar Petersen, og í álopinum vóru Dan Mortensen og Hallur Christiansen. Í 2. hálvleiki komu Eyðun Svalbard og Dion Petersen inn.

JH

TB–HB 0–10 (0–0)

0–1: Magni Jarnskor 47.
0–2: Magni Jarnskor 50.
0–3: Jóan Petur Olsen 54.
0–4: Helgi Reinert Petersen 55.
0–5: Óli Hansen 57.
0–6: Helgi Reinert Petersen 65.
0–7: Hans Pauli Petersen 70.
0–8: Pauli Jarnskor br 81.
0–9: Óli Hansen 88.
0–10: Súni Olsen 89.

Dómari: Petur Reinert

Hevur tú pínu?
BIOflex hjálpir sjálvt ringastu pínuni!
BIOflex magnetviðgerðin hjálpir m.a. móti:
- Tennisalboga
- Koyrilsbresti
- Akslapínu
- Ryggjapínu
- Knæpínu
- Øklapinu
- Liðapínu



Magnetið verður klistrað á pínustaðið og byrjar at virka beinanveg. Eftir heilt fáum døgum kennist munandi betring. Magnetini fáast í ymiskum støddum. Ring og fá meira at vita frá:
Vello Føroyar
Boks 354 - FO-700 Klaksvík
Tlf: 217916 - Fax: 457916
BIOflex® MAGNETTERAPI
Sosialurin - 311820

Tavar
Yrkinga-savnið
Fæst í bóka-handlunum

ÁRSAÐALFUNDUR 2000
Aðalfundur hjá 12. Manni verður hildin á loftinum í ÍSF-húsinum hóskvøldið 6. apríl kl. 19.00.
Allir limir eiga at møta.
Nýggir limir kunnu tekna seg á fundinum.
12 MADUR
www.soccer.at/faroes
Sosialurin - 311820

Jákup og teir tosa nú um heiðursmerkir

Superligan: Herfølge styrkti nógv um oddasessin, tá teir megnaðu at enda omaná, sjálvt um AGF hevði verið á odda 2–0

Munnu tað vera gullmerkini, sum teir nú tosa um í Herfølge?

Herfølge, sum eftir tveir ósigrar av fleiri varð mett ikki at hava orku til at halda fram í kappingini um DM, styrkti sunnudagin um støðuna í oddinum í superliguni.

Higartil hava John Faxe Jensen, Jákup Mikkelsen og hinir á oddaliðnum sagt, at teir miðja eftir at enda millum seks tey fremstu liðini, men eftir at gloppið niður til Brøndby á næstfremsta plássinum sunnudagin dragnaði til fimm stig, sær føroyski málverjin uppaftur ljósari uppá framtíðina:

– Lagið var gott, tá vit sunnukvøldið koyrdu til hús aftur. Vit steðgaðu í Vejle at fáa okkum døgurða. Meðan vit fingu okkum, sóu vit onside í TV3, og sjálvsagt kom tað væl við at frætta, at Brøndby og Lyngby høvdu spælt javnt, 2–2. Tað eru sjey stig eftir til AB og Lyngby á triðja plássi, og tí haldi eg ikki, at tað er burturvið, um vit, nú tað eru tólv umfør eftir at spæla, rokna við møguleikanum at enda á heiðursmerkjaplássi, heldur Jákup Mikkelsen.

Um tað eydnast Herfølge at vinna medaljur, so fer tað at hava við sær, at teir eftir summarfrítíðina fyri fyrstu ferð nakrantíð skulu royna seg í Europa Cup. Síðsta ár spældu teir í Intertoto Cup, uttan at teir løgdu stórvegis fyri, og úrslitini vóru heldur einki serlig.

Sá einki serligt út

Dreymurin um fyrsta føroyska lutabrævið í einum donskum meistaraskapi í fótbólti tóktist seinnapartin sunnudagin at kámast í áarførinum í Århus. Tá Herfølge og AGF fóru at hvíla seg, vóru teir 3.783 áskoðararnir í góðum hýri, sjálvt um oysandi regnið átti at tikið eitt sindur burtur av várveðrinum.

Tveir minuttir undan steðginum hevði AGF økt um leiðsluna til 2–0, og harvið hevði Herfølge síðani vetrarsteðgin spælt 225 minuttir, seks mál vóru farin ígjøgnum, og teir høvdu einki skorað sjálvir, so tað sá ikki gott út.

– John Faxe var á beinkinum alla tíðina, tí hann hevði ein skaða at dragast við. Hann gav okkum ein orduligan vals í steðginum, og tað var heilt skjótt í 2. hálvleiki, at vit vóru betri við, sigur Jákup Mikkelsen.

Føroyski málverjin var serliga fegin um, at tað hesa ferð eydnaðist at vinna øll stigini:

– Fyrsta málið átti eg alt, sum tað var. Bólturin var hálur og torførur at halda. Hesa ferð hevði eg fingið fatur á honum, men misti hann millum armin og kroppin og fyri føturnar á Bo Nielsen, sum skoraði.

Eitt korter var farið, tá Jákup var óheppin, og føroyski málverjin, sum altíð krevur nógv av sær sjálvum, var heldur ikki nøgdur, tá AGF økti um leiðsluna:

– Johnny Mølby sendi fríspark framvið manngarðinum hjá okkum og í ta síðuna á málinum, sum eg skuldi verja. Eg tveitti meg og var vísur í, at eg skuldi bjargað, men bólturin fór upp um hondina og í netið.

Sjónvarpsupptøkurnar vístu, at bólturin stakk í svørðin einar tveir metrar frá málverjanum, og vætan setti eyka ferð á.

Heilt øðrvísi

Herfølge vann 3–2, tí teir skoraðu trý mál innanfyri níggju minuttir í 2. hálvleiki.

Eftir dystin harmaðist venjarin hjá AGF, Peter Rudbæk, sum framvegis heldur Óla Johannesen heilt uttanfyri hópin, um, at teir høvdu tapt, tí tíðliga í 2. hálvleiki høvdu teir fleiri møguleikar at leggja lok á, men tá bjargaði Jákup Mikkelsen væl.

Eftir ein tíma misti eykamálverjin hjá AGF, Jakob Kragh, hála bóltin til Jesper Falck, tveir minuttir seinni javnaði Thomas Høyer við spakuligum skoti, og eftir 70 minuttir skoraði Jesper Falck sigursmálið.

– Vit spældu heilt øðrvísi í 2. hálvleiki, enn vit høvdu gjørt í 1. hálvleiki. Uppleggið hjá venjaranum var, at vit skuldu liggja aftarlaga og spæla bóltin ímillum okkara, men hetta komu vit ikki væl frá. Í 2. hálvleiki fóru vit longri fram á vøllin og trýstu mótstøðumenninar, og tá verjan hjá teimum ikki var serliga sannførandi, so eydnaðist tað okkum at spæla okkum til fleiri møguleikar, sigur Jákup Mikkelsen.

Stutt undan dystarloki hevði AGF risastóran møguleika at javna, men álopsmaðurin varð av málverjanum kroystur at yvirplasera bóltin, sum tók í stólpan, áðrenn hann fór aftur í spæl.

Toppstríð

Í gjár fóru teir í Herfølge at fyrireika seg til næstu uppgávurnar. Mánakvøldið fáa teir vitjan av Viborg, sum ikki hevur staðið seg serliga væl síðani vetrarsteðgin og tí verður mett at vera svangt og harvið vandamikið. Dysturin teirra millum í Herfølge verður at síggja í TV3+.

Komandi vika verður strevin hjá Herfølge, tí hóskvøldið og aftur annan sunnudag skulu teir spæla í Gladsaxe móti AB. Fyrra uppgerðin verður fjórðingsfinala í steypakappingini, og síðani verður tað toppuppgerð í superliguni:

– Vit hava altíð havt trupulleikar, tá vit hava spælt móti AB. Teir og vit fluttu upp saman í 1995, og so vítt eg minnist, so hava vit ongantíð vunnið móti teimum síðani tá. Men tað mugu vit gera nakað við nú, heldur Jákup Mikkelsen, samstundis sum hann ásannar, at venjarin hjá AB, Ole Mørch, kennir Herfølge liðið betri enn so nógv onnur gera.

JH

Støðan, danska superligan

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Herfølge	21	12	-	4	-	5	35	28	7	40
2 Brøndby	21	10	-	5	-	6	27	24	3	35
3 AB	21	9	-	6	-	6	33	26	7	33
4 Lyngby	21	10	-	3	-	8	33	30	3	33
5 Viborg	21	9	-	5	-	7	29	29	0	32
6 Silkeborg	21	8	-	7	-	6	36	21	15	31
7 AaB	21	7	-	9	-	5	32	25	7	30
8 FCK	21	8	-	4	-	9	27	21	6	28
9 OB	21	5	-	8	-	8	18	27	-9	23
10 Esbjerg	20	6	-	2	-	12	23	38	-15	20
11 AGF	20	4	-	6	-	10	19	32	-13	18
12 Vejle	21	3	-	9	-	9	23	44	-21	18

Todi venur við fullari ferð

Superligan: Føroyingurin í FCK hevur ikki verið førur fyri at vant saman við liðfeløgunum í næstan tríggjar vikur

Todi Jónsson sat heima við hús í Keypmannahavn seinnapartin sunnudagin og fylgdi við í fróttarsendingini hjá P3 útvarpinum. Sjálvsagt var føroyski álopsmaðurin serliga spentur uppá, hvussu tað hilnaðist hjá FCK, sum var í Vejle. Og hóast einir fýra av føstu monnunum hjá FCK ikki vóru við í Vejle, tí teir vóru skaddir ella leikbannaðir, so komu Kim Brink og hansara menn úr aftur Jyllandi og til høvuðsstaðin við sigrinum.

FCK vann við 7–2, og tað er ikki í hvørjum umfari, at eitt lið í superliguni skorar so nógv mál.

Norski álopsmaðurin Harald Brattbakk skoraði trý mál, og Thomas Thorninger, og David Nielsen, sum ikki kom á vøllin fyrrenn miðskeiðis í 2. hálvleiki, skoraðu tvey í part.

Verjan hjá Vejle var ússalig, men fyri teir í FCK er tað sjálvsagt hugaligt, at tað av álvara gekk undan við málskjótingini.

Plássið biðar

Hevði tað verið fyri einum ári síðani, so hevði tað kanska verið hugsandi, at møguleikarnir hjá Toda Jónsson at koma aftur á liðið minkaðu, tá teir, sum manna fremstu plássini, hava skorað nógv mál, men soleiðis tykist tað ikki vera longur. FCK venjarin hevur gjørt av, at fremsti álopsmaðurin á føroyska landsliðnum skal vera miðvallari í superliguni, og tað er væl hugsandi, at Todi verður á hesum plássinum komandi sunnudag, tá FCK skal til Silkeborg.

– Leygardagin varð eg testaður fyri at vita, um tað bar mær til at spæla í Vejle, men venjarin valdi at halda meg uttanfyri, og tað kann gott vera, at tað var skilagott. Skaðin, sum eg fekk í knæið í Suðurafrika, er burtur, men tá eg fór at venja aftur við fullari ferð, fekk eg ein lítlan vøddaskaða í lærið. Ivaleyst kom hesin skaðin orsaka av knæskaðanum, men nú er hann burtur, og nú venji eg aftur við fullari ferð, sigur Todi Jónsson.

At hann ikki hevur vant við fullari ferð og saman við liðfeløgunum í tríggjar vikur ger, at Todi Jónsson er ikki í fullgóðari venjing, men nú hevur hann eina viku at koma fyri seg aftur í, og tað áttu at verið líkindi fyri hesum, tí venjingarstøðan var heilt góð fyri trimum vikum síðani.

Mikukvøldið í aðru viku, ella tríggjar dagar eftir landskappingardystin í Silkeborg, kemur Silkeborg í Parkina at spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini.

AaB smokkað

Sigurin hjá FCK kom serliga væl við, tí tvey av liðunum, ið eru niðanfyri FCK á støðutalvuni vunnu.

Serliga óvæntað var tað, at ØB fekk øll stigini í Aalborg. Hetta hevur við sær, at meistaraliðið, sum vitjaði á Tórsvølli síðsta summar, má metast at hava mist møguleikan at endurvinna meistaraskapin. Fyrrverandi AaB álopsmaðurin Søren Andersen skoraði bæði málini hjá OB.

Esbjerg fekk øll stigini í Viborg. Tá tíggju minuttir vóru farnir, vóru teir á odda 2–0. Dagsins maður var Kenni Sommer, sum skoraði øll málini hjá Esbjerg.

Í AB mundu teir fáa mót at nýggjum, tá tað eydnaðist teimum at vinna fyrsta heimasigurin síðani 26. august í fjør. Rasmus Daugaard skoraði bæði málini móti Silkeborg.

JH

Úrslit, danska superligan

AB-Silkeborg 2-0
AGF-Herfølge 2-3
Aab-OB 1-2
Vejle-FCK 2-7
Viborg-Esbjerg 2-3
Brøndby-Lyngby 2-2